# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Trúgvasti stuðulin hjá Løkke

Í Sosialinum leygardagin viðger Edmund Joensen, løgtings- og fólkatingsmaður, eina oddagrein í Sosialinum í síðstu viku, har vit vístu á, at tá Edmund Joensen í dag blívur tungan á vágskálini í donskum politikki, so hevur hann møguleikan at trýsta eitt sindur á fyri at fáa hjartamál sítt um fastfrystingina av blokkinum avtikna av Fólkatinginum.

Í dag tekur Christian H. Hansen, fólkatingsmaður, sum er valdur fyri Dansk Folkeparti, aftur sæti á Fólkatingi eftir eina longri sjúkralegu. Hann hevur boðað frá, at hann samstundis tekur seg úr Dansk Folkeparti, og harvið hevur stjórnin bert eitt tinglim í meiriluta. Tað er hesari støðu, sum Edmund Joensen kundi gjørt sær dælt av – í øllum førum, um hann arbeiddi eins oppurtunistiskt í Fólkatinginum, sum hann ger í Løgtinginum.

Í Løgtinginum er Edmund Joensen ein av teimum »strævnu dreingjunum« hjá Kaj Leo Johannsen, løgmanni og formanni í Sambandsflokkinum. Edmund Joensen er ein av sambandstingmonnunum, sum ikki vil akta og ganga í takt og gera tað, sum flokkurin sigur.

Tí er tað eisini nærliggjandi at hugsa sær, at soleiðis fer hann eisini at gera í Fólkatinginum – so hann har kann fáa sær leiklutin, sum tann »strævni drongurin hjá Lars Løkke Rasmussen«. Men soleiðs fer Edmund Joensen ikki at gera. Hann fer at akta Lars Løkke Rasmussen nógv betur, enn hann aktar egna formann sín í Føroyum.

Og illa var. Bæði Edmund Joensen og allir føroyingar høvdu rættiliga fingið oyrini í maskinuna, um hann fór at brúka musklar til slíkt í Fólkatinginum. Og vit skilja eisini, at ein føroyskur fólkatingsmaður ikki kann fara at handla beint ímóti tí, sum landsstýrið og samgongan annars vilja í sambandi við blokkin og tiðningina av blokkstuðlinum. Treyðugt so.

So vit kunnu bara geva danska politiska eygleiðaranum, Hans Engell, rætt, tá hann segði við danska TV2, at í Edmundi Joensen hevur Lars Løkke Rasmussen tann allar trúgvasta fólkatingsmannin, sum hann kann fáa í Føroyum.

Men tað sama kann man so ikki siga um stuðulin, sum Edmund Joensen gevur sínum føroyska floksformanni.

**Sosialurin**

## Átali viðferðina av hvalbiarpresti í Útvarpinum

**MAGNUS BRAHÉ JØRGENSEN**
sóknarprestur



Undirritaði sóknarprestur vil harðliga átala viðferðina fyrrverandi sóknarpresturin í Hvalba hevur fingið í Útvarpinum í seinastu viku. Hugsaði journalisturin Høgni Djurhuus um, hvørjar fylgjur hesin tíðindastubbin við innliti í málinum um fyrrverandi hvalbiarprestin, Ólav Rasmussen, kann fáa fyri bæði Ólav sjálvan og familju hansara og børnini og alt rundan um hann. Børnini verða kanska happaði í skúla og barnagarði við teimum sárum, tað kann geva. Konan og restin av familjuni skulu finna seg í háðandi smílum alla staðni, tey koma.

Hevur hesin journalistur hugsað, hvørji etisk virðir hann hevur í vali sínum av tíðindum. Eg haldi, ið hvussu er, at hetta saktans kann jarðleggja eina heila familju, og geva teimum sálarligt mein og kanska eisini forkoma mongum framtíðarmøguleikum teirra.

Eg haldi, at viðkomandi journalistur átti at hugsað seg um meir enn eina ferð, tá hann valdi hesi tíðindi. Tað er hóast alt menniskju, tað snýr seg um.

## Hví so aggresivur, jú eg skilji

**GERHARD LOGNBERG**
løgtingsmaður



Eg havi funnið mær ark og penn fram, okkurt er álíkavæl, sum sigur; legg einki í at gera hesa viðmerking.

Eg royni at mótmæla móti mær sjálvum, men orðatakið sigur, at tann sum tigur samtykkir.

Hvat er tað, sum borgarstjórin í Skúvoy, Harry Jensen, vil við øllum hesum hálvkvøðnu vísunum og skriving í kotum.

Eg havi roynt at fylgt við skrivingini hjá Harry, hann metur, at eg havi gjørt ov lítið ella als einki. Møguliga hevur tú rætt, men eg havi gjørt tað, eg havi verið mentur ella tað sum hevur staðið í mínari makt.

Eingir pengar komu á hesum sinni til havnina í Skúvoy. Men tað komu heldur eingir til Sandoyartunnilin, hóast tað stendir í samgonguskjalinum. Ei heldur fekk Dalstunnilin nakað.

Men eg kempi víðari við øllum hesum, helst meinar tú, at onkur annar hevði klárað tað betur, ella førur tú propaganda fyri ávísar persónar.

Tú sigur teg hava skrivað brøv. Nú eri eg kanska ikki av bestu teldusnidlingum, sum tú veit, so eri eg í tí aldursbólkinum, har teldan ikki var okkara amboð. Men eitt kann eg siga, at Javnaðarflokkurin fekk eitt skriv frá Skúvoyar Kommunu um havnarviðurskiftini, og var brævið til viðgerðar í tingbólkinum og fekk skrivarin boð um at svara kommununi aftur. Tað trúgvi eg, at hon hevur gjørt.

Síðan havi eg, hondina á hjarta, einki brævi, hvørki á gerhl@olivant.fo, sum er mín teldupostadressa ella á annan hátt fingið nakað.

Annars fekk eg eitt sms, sum var alt annað enn positivt. Eg havi tað enn. Eingin avsendari var, so eg ringdi til Føroya Tele og spurdi, hvør átti telefonnummarið, jú Harry Jensen. Har leitaði man ikki eftir tí besta.

Síðan heldur Harry áfram at ákæra fólk fyri ikki at svara honum. Hann sigur seg hava skrivað til Rættarnevndina, har eri eg næstformaður. Eg kenni einki til nakað brævi.

Kanska skuldi tú rannsakað teg sjálvan, um okkurt er galið frá tíni síðu, tí øll kunnu ikki vera so óndskapsfull ikki at svara tær.

Alfred Olsen er formaður í rættarnevndini, eg kenni hann ikki sum ein, ið krógvar brøv, sum koma til rættarnevndina.

**M/S Ritan**

Tá Harry harmast um at Ritan ikki skal sigla upp á Skúvoy, so harmist eg og vil gera alt, sum stendir í míni makt, so Skúvoy ikki missur hesar túrar.

Men Harry, hvussu gjørdu tey, sum sótu áðrenn tú í kommunustýrinum.

Tí hetta at ætla at taka Rituna úr sigling hevur verið ofta frammi, og ætlanin at seta »Dragaberg« inn í rutu, tildømis.

Hvat gjørdi kommunustýrið í Skúvoy, jú borgarstjórin tók telefonina og ringdi 222662, altíð við síni mildu rødd, Gerhard nú mugu vit gera okkurt. Jú so fóru vit til Tórshavn at hitta teir á hægstu rók, og vit fóru glaðir aftur til hús, tað gerst ikki upp á annan máta.

Heldur enn at leggja fólk undir líkt og ólíkt.

Eg kann taka siglingina hjá Teistanum sum dømi. Mitt í øllum hoyrdist, at fleiri túrar skuldi niðurleggjast, og prísurin hækka við 25%.

Hvat var hjá mær at gera, eg kundi einki gera sjálvur. Men fekk hjálp frá tingfólki, ikki minst frá landsstýrismanninum Johan Dahl, alt hetta bleiv nær um óbroytt. Loysnin var forhandling.

Harry hvat er blivið tín stóri trupulleiki, at tosa við meg, nú tú er blivin borgarstjóri.

Áðrenn høvdu vit samskifti, og so vítt eg veit, noktaði eg ikki nakrantíð, um tú heitti á meg, og tað gjørdi tú við at ringja til mín. So nemt var tað.

Jú Harry, fær og spyr teir, sum sótu áðrenn, hvussu teir gjørdu, tí tað ber væl til at byggja upp á erfaringar hjá ørðum.

Tá Harry, ímillum linjurnar og óbeinleiðis, leggur meg undir at vera ein, sum vil Skúvoy tað ringasta, ja so rakar tað meg meinari enn tú ánar.

Tí frá barnsbeini av sat mamma mín og fortaldi um slekt og søgu og um ættarbandið, um bjargingarmenn, sum vóru av teimum bestu. Hon átti nógvar góðar løtur í Skúvoy og Dímun.

Alt hetta bergtók meg sum óvita. Eg fari at gera, hvat eg eri mentur fyri Skúvoy og havi eg roynt tað, síðan eg setti fótin inn um tinggátt.

So skilmaðurin, vælsignaður ring tá tú metur teg hava brúk fyri mær, ella hvat tað nú einaferð kundi verið, heldur enn at ákæra og niðurgera. Á slíkan hátt gongur einki.

Annars, Harry, ynski eg tær og tínum alt tað besta.

Við kvøðu til skúvoyingar.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.